firði. Her var nóg mikið at gera við at gera nýggj trol. Hetta var júst tann tíðin, tá ið teir nógvu trolararnir vóru komnir til landið aftaná heimsbardagan. Konufólkið knýtti trolnetið fyri akkord, meðan vit riggaðu trolini til. Hetta gekk hampuliga væl í nøkur ár. Tá blivu so ringar tíðir fyri trolarar, og teir flestu blivu eisini seldir av landinum aftur.

Tá tók sildin við. Føroysk skip fóru við gørnum at veiða sild millum Føroyar og Íslands á sumri. Tá gjørdist nógv arbeiði av at gera gørn til. Tey gomlu gørnini vóru bøtt, og nýggj vóru monterað. Eg átók mær heilar reiðskapir frá skipunum. Ein góður kundi var D.P. Højgaard á Toftum. Teir høvdu eini 10 skip á sild. Eg vaskaði og turkaði gørnini og lat tey út til menn til at bøta heima fyri ein fastan prís fyri hvørt garn. Hetta var mest vetrararbeiði hjá eldri monnum, eisini í Gøtu. Teir sótu vanliga heima í køkinum og arbeiddu.

Tað hendi ein stór broyting við gørnum seinast í 60-unum. Upprunaliga var tað bert bummullsgørn. Fyri tað fyrsta máttu tey saltast, meðan tey vóru drigin, serliga seinastu setuna. Men tey rotnaðu skjótt og hildu lítið. Men so byrjaðu skipini so við og við at fáa nylongørn. Tey fyltu nógv minni og fiskaðu meira. Tey hildu eisini betri, so tað var minni arbeiði av teimum.

Seinasta ár, skipini fingu nakað av sild, var í 1968. Tey royndu í 1969, men tá var púra einki at fáa. Tískil fall henda vinnan burtur. Nú var Hans Petur eisini farin at eldast og gavst.

## Nótavinnan tekur seg upp

Tá er tað, at nótavinnin tekur seg upp. Fyrsta kraftblokkaskipið var Brestir í 1962. Men í 1965 og árini aftaná eru nógv línuskip, sum fáa sær kraftblokk. Hetta skapti tørv á einum nótaverkstaði, sum kundi bøta nótirnar, tá ið skipini komu inn. Hetta vant so uppá seg. Eg keypti turkihúsið hjá Haraldsen í 1967 til hetta endamál.

Virksemið gjørdist enn størri við størri skipum og eisini størri nótum.

Nótavirkið var gjørt um til partafelag. Í 1971 var versonurin Måns komin uppí virkið.

Sama ár varð nýtt nótavirki bygt. Hetta var væl útgjørt eftir tátíðar málistokki. Tá kundu vit taka nótina beinleiðis av skipinum inn á virkið. Vanliga arbeiddu 12 mans, og teir kundu vera upp til 18. Her mátti ofta arbeiðast skjótt. Skipini skuldu hava nótina umborð aftur sum



*Tórir var við Kyrjasteini*



*Skipari var verfaðirin Hendrik í Bug*



*Turkihúsið hjá Haraldsen sum var fyrsta innilokaða nótavirki hjá Tórir*

skjótast. Tá varð arbeitt í fullari ferð til nótin var liðugt umvæld.

Vit høvdu íslendingar til arbeiðsformenn. Teir vóru jú vanir við slíkt arbeiði, og høvdu nógvar royndir við nótaarbeiði.

Tað vóru eisini nógv íslendsk nótaskip, sum komu at fáa nótina umvælda.

Tá fóru vit at hugsa um at byggja nótaskip. Gøtunes kom í 1974, bygdur í Noreg. Tróndur Tróndarson, ættaður úr Skálavík, var skipari. Gøtunes tók 400 tons. Hetta ljóðar ikki av nógvum í dag, men hann varð roknaður sum stórur nótabátur tá. Tey fyrstu nótaskipini tóku eini 150 tons. Skipini blivu tá størri og størri. Vit seldu Gøtunes í 1978 og keyptu annan Gøtunes. Hesin var ein eldri umbygdur norskur nótabátur, sum tók 1.000 t., og hann var eisini stórur tá í tíðini. Vit umbygdu hann soleiðis, at hann somuleiðis kundi trola eftir svartkjafti, ið tá varð uppkomin. Men nú gekst ikki so væl, og tað var ikki sørt av trupulleikum heldur. Vit sleptu okkum tí av við hann í 1981. Samstundis hildu vit, at vit skuldu gevast við hesum virksemi, meðan leikur var góður. Seinni keypti Vónin nótavirkið.

## Tíð at gevast

Eg var tískil 63 ár, tá ið eg gavst við vinnuligum virksemi. Men eg havi kortini ikki kett meg.

Eg havi gjørt nógv av at ferðast og havi verið nógvar ferðir í Íslandi, har eg havi nógvar vinir, ikki minst frá tíðini við nótavirkinum.

Eisini havi eg verið virkin í dansifelagnum. Mær dámar væl at dansa føroyskan dans.

Eg giftist í 1946 við Fíu, sum var dóttir Katrinu og Hendrik í Bug. Hann átti og førdi Fame í nógv ár.

Vit fingu tvær døtur, Hjørdis og Katrin. Tær eru giftar og eiga tvey børn í part. Eg eigi nú 4 langabbabørn. Fía doyði 1989. Vit bygdu í Fuglafirði, men eftir at eg hevði lagt frá mær, bygdu vit eini hús í Norðragøtu. Hjørdis og Måns bygdu omanfyri hjá okkum.

Eg eigi tvey systkin. Jákup hevur verið fiskimaður alla sína tíð. Hann búði nógv ár í Danmark, har hann fiskaði. Nú er hann búsettur í Vestmanna, haðani kona hansara Sólrun er. Tey hava ættleitt Poul Petur.

Astrid flutti niður til Danmarkar. Hon giftist við Palla Forsberg Madsen, landsrættarsakførara í Keypmannahavn. Tey fingu børnini Gunna, Lisbeth og Elin.

## Tøkk og tillukku til Tórir

Her endar frásøgnin hjá Tórir, og gevur hon eitt gott innlit í lívið hjá einum virknum manni, eins og vit hava fingið eina góða lýsing av lívinum í Gøtu, og serliga í Norðragøtu, fyrrrapartin í farnu øld.

Samstundis hava vit fingið eina góða lýsing av lívinum í Blásastovu, sum í dag er tað hús í bygdini, sum hevur flestar vitjanir úr øllum heiminum.

Í morgin verður Tórir 90 ára gamal, vit fara at ynskja honum hjartaliga tillukku við hesum stóra degi.

Í komandi parti fara vit at hava fleiri frásagnir frá gomlu Norðragøtu.